Almanna- og heilsumál mest skerd

Ein triðingur av allari skerjingini er at finna innan almannamál, sum eru skerd við 35 miljónum. Haraftrat skulu sjúkrahúsini spara 12 miljónir

Spariknivur landsstýrisins kemur helst at raka meint onkustaðni. Av teimum 107 milliónunum, sum kutaðar eru burtur í mun til figgjarlógaruppskotið hjá undanfarna landsstýri, eru heilar 35 mill. tiknar av økinum sum eitur Almannamál. Hetta svarar til umleið ein triðing av samlaðu sparingunum.

Heilsumál sleppa heldur ikki undan skerjingum. Tey trý sjúkrahúsini eru skerd við 12 milliónum og Skúlaverkið við umleið 10 milliónum.

Á inntøkusiðuni verður roknað við, at 130 milliónir koma meir inn í skatti enn frammanundan mett. Hinvegin verður ikki roknað við eins nógvum tolli, sum undanfarna landsstýrið metti. Her verður roknað við 40 milliónum færri. Sostatt verða umleið 90 milliónir í meirinntøku. Leggja vit so skerjingarnar uppá 107 milliónir afturat, verða útvið 200 meira í landskassanum.

Í grunnar

Ein stórur partur av meirinntøkuni verður settur í grunnar. Læraraskúlin í grunn 9 milliónir, sjónvarp 8 milliónir, Fiskirannsóknarstovan 10 mill., upphøggingargrunnur 10 mill. og fimm milliónir fara afturat í grunn til vaktarskip. Í grunn til effektivar veðhaldsbindingar fara 60 milliónir og á reguleringskonto skulu 45 milliónir setast. 30 milliónir eru avsettar afturat til fiskivinnu.

Eingin nýggj havnargerð í ár

Skert verður á flest øllum økjum. Eisini innan samferðslumál, sum eru skerd við 21 milliónum. Hetta hevur m.a. við sær, at tøkar vera nú bert 15 mill. til nýgerð av vegum og viðvikjandi havnagerð er skorið so djúpt, at eingin nýggj havnargerð verður framd í ár.

Færri og dýrari túrar

Strandferðslan skal spara 7 prosent. Til at røkka hesum máli má ferðaseðlaprisurin hækkast og farmaprisurin somuleiðis. Ætlanin er at hækka allar ferðaseðlar við í meðal 15 prosentum og farmaprisin við 10 prosentum. Harafturat verða nakrir túrar hjá Strandferðsluni strikaðir.

Bygdaleiðir skulu spara 1,7 milliónir og hevur landsstýrið ætlanir um at selja nakrar av bussunum. Hetta fer kortini ikki at nerva tænastustøðið, verður sagt. Bussarnir eru tveir í Vágum, Norðstreymoy og Suðurstreymoy og ein bussur í Suðuroy.

Broytingaruppskot landsstýrisins til figgjarlóg varð lagt fyri tingið seinasta friggjadag og kemur helst til viðgerðar hósdagin.




Tey trý sjúkrahúsini eru skorin niður við um 12 milliónum. Av hesum landssjúkrahúsið 8,6 mill.

tór.-

Skúlaøkið hart rakt

av skerjingunum hjá landsstýrinum. Framburðurin innan skúlaøkið verður tálmaður og nakað av tí, sum er í gongd, má steðgast, sigur landsskúlaráðið.



Fleiri næmingar skulu nú undirvísast samstundis, men enn eru vit ikki komin til at allur skúlin skal undirvísast í auluni

Av teimum økjum, har skerjingarnar hjá landsstýrinum fara at merkjast eina harðast, verður skúlaøkið. Landsskúlaráðið sigur m.a. í viðmerkingum til skerjiætlanirnar, at ein stórur partur av teimum hugsjónum, sum menn høvdu í samband við nýggju skúlalógina, sum kom í gildi í 1979, eru enn ikki settar í verk. Verður skert so mikið, sum landsstýrið skýtur rupp, má ein gera sær greitt, at hesin framburður verður tálmaður og nakað av tí, sum er í gongd, má steðgast, sigur landsskúlaráðið.

Millum annað hevur landsstýrið skotið upp, at upphæddin til læraralønir verður skerd við trimum prosentum, uttan tó at vísa á hvar og hvussu hesi prosent skulu takast. Hetta heldur landsskúlafyrisitingin ikki fer at bera til og vísir á, at allar læraralønir eru sáttmálabundnar ella lógarbundnar.

Landsskúlafyrisitingin vísir eisini á, at orsøkin til, at útreiðslurnar til fólkaskúlan vaksa er, at í dag verður miðað ímóti, at øll børn eiga at fáa undirvísing í heimligum umhvørvi. Eisini øll brekað. Hetta krevur sjálvsagt fleiri útreiðslur til lønir, verður sagt.

Stórt afturstig

Eitt annað øki innan landsskúlafyrisitingina er fritiðarundirvísingin. Fleiri av táttunum innan lógina um fritiðarundirvísingina eru enn ikki settir í verk og skal skerjast í tilíkan mun, sum landsstýrið skýtur upp, verður seinur dagur at hetta verður gjørt, sigur landsskúlafyrisitingin.

— Roknað verður við, at okkara samfelag fer at gerast meira og meira eitt fritiðarsamfelag, og kemur tá at vera brúk fyri fritiðarundirvísing og -virksemi. Tað má tí haldast at vera stórt afturstig, at skera so nógv burtur, sum ætlanin er, sigur landsskúlafyrisitingin sum leggur afturat, at torført er at siga frammanundan hvørjar avleiðingar verða av hesum stóra niðurskurði, eisini tá hugsað verður um, at royndirnar bæði úr Føroyum og útheiminum sýna, at øll fritiðarundirvísing hevur eina sera positiva sosiala ávirkan og ikki minst fyribyrgjandi ávirkan serliga á tey veiku í samfelagnum.

tór.-